


# Smartur Kia Sportage frítíðarbilur

*Kia Sportage er ein sonevndur SUV (Sport Utility Vehicle), ein frítíðarbilur til fleiri ymisk endamál*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Kia Sportage er nú avloystur av einum heilt nýggjum bili við sama navni. Designið er smart, bilurin sær gott út og kvaliteturin er á sama høga støði sum á tí størra Kia Sorento. Bilurin fæst bæði sum bensin og diesel**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Kia er skjótast vaksandi bilmerki í Evropa. Í 2003 seldi Kia Danmark 3.012 bilar og í 2004 seldu teir 5447 bilar. Í ár hava teir sett sær fyri at selja 10.000 bilar. Hetta er eitt høgt mál at seta sær, men við teirra breiða bilhandlaraneti er nokk einki sum forðar fyri tí.

Nýggj modell koma alla tíðina, og nú er Kia Sportage komin í eini heilt nýggjari útgávu. Bilurin er ein sonevndur SUV (Sport Utility Vehicle), ein frítíðarbilur sum kann nýtast til fleiri ymisk endamál. Samstundis er hann ein rúmligur jeepur og »offroadari« við permanentari 4-hjólsdrift. 4x4 skipanin arbeiðir við elektroniskari deiling av drívmegini, ið ger at bilurin klárar seg væl í kava og hálku um veturin og til koyring uttan fyri vanliga koyrivegin.

Kvaliteturin er á sama høga støði sum á tí størra Kia Sorento. Designið er smart, og bilurin sær gott út, og hann fær sera góð ummæli frá motorjournalistum, eisini viðvíkjandi trygdini við t.d. gardinairbag, ESP, og bremsiassistenti.

Sportage fæst við trimum ymiskum motorum, einum diesel og tveimum bensin, dieselmotorurin er ein 2,0 litur CRDi við 112 hk, og bensinmotorarnir eru ein 2,0 litur við 141 hk, og síðan ein 2,7 litur V6 við 175 hk.



Bilurin vit royndarkoyrdu var ein 2.0 litur diesel við 112 hk. Bilurin er lættur og góður at koyra, dieselmotorurin kraftar væl og er sera ljóðleysur.

## Kia Sportage 2.0D 4WD

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur 4 syl. diesel 112 hk |
| 0-100 km/t | 13,8 sek |
| Oljunýtsla | 14,1 km/l |
| Dekkstødd | 215/65-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 435,0 cm |
| Breidd | 180,0 cm |
| Hædd | 173,0 cm |
| Vekt | 1.600 kg |
| Prísur: | kr 316.000 (persónvognur) (vøruvognur kr 266.800) Bensin útgávurnar kosta úr kr. 251.800 |
| Søluumboð | D. B. Bilar<br>J. Broncksgøta 15<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 310 600<br>www.dbbilar.fo |

*The Kia Family - has a car for every one.*



Vælkomin til ein royndartúr, vit hava júst tygara bil. Sambært F.D.M. hevur Kia besta bilgaranti yvirhøvur.

KIA

KIA er skjótast vaksandi bilmerki í Evropa

Pf. D. B. Bilar
Tel 310 600 · www.dbbilar.fo